# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólkum til 4 børn í Runavíkar kommunu, at byrja 15. august ella eftir nærri avtalu

1. Stuðulsstarv á 30 tímar um vikuna, til eina 5 ára gamla gentu. Endamálið við stuðlinum er í samstarvið við avvarðandi myndugleika og foreldur at menna og stimbra gentuni í sosiala samspælinum við onnur børn. Arbeiðsstaðurin er ansingarstaðið hjá barninum.

2. Stuðulsstarv á 30 tímar um vikuna til ein 4 ára gamlan drong. Endamálið við stuðlinum er at menna og stimbra dreinginum rørsluliga, sálarliga og sosialt. Arbeiðsstaðurin er ansingarstaðið hjá barninum.

3. Stuðulstarv á 20 tímar um vikuna til ein 7 ára gamlan drong. Endamálið við stuðlinum er at hjálpa dreinginum í sosiala samspælinum við onnur børn. Arbeiðsstaðurin er ansingarstaðið hjá barninum.

4. Stuðulsstarv á 25 tímar um vikuna til familju við 2 børnum. Endamálið við stuðlinum er eftir skúlatíð at geva børnunum ein tryggan og regluligan dagligdag. Arbeiðið umfatar eisini innkeyp og matgerð. Arbeiðstaðið er heima hjá familjuni.

Størvini nr. 1, 2 og 4 eru tíðaravmarkað til 30. juni 2006. Starv nr. 3 er tíðaravmarkað til 30. desember 2005, men kann verða longt.

Ynskiligt er, at tey, ið sett verða, hava hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Barnaverndarnevndina á tlf. 44 95 29.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verur at senda Barnaverndini í seinasta lagi týsdagin 2. august

**Barnaverndarnevndin**
**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur 26 · 600 Saltangará

---

**Heimarøktin og Serforsorgin**
**Serstovnadeildin**
**Umlættingin á Garðavegi**
**Garðavegur 38 · 700 Klaksvík**

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki til umlættingina 20 tímar um vikuna at byrja 1. august 2005.

Vit sóknast eftir starvsfólki, sum hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni.

Vit bjóða eitt arbeiði har tú hevur ávirkan á innihaldi í starvinum og gerandisdagin hjá búfólkunum. Sum er m.a. úti virksemir, svimjing og gongutúrar.

Umlættingin á Garðavegi er ein stovnur fyri børn og ung við sjúkragreiningini autismu.

Á stovninum starvast 7 fólk.

**Løn og setanartreytir:**
Talan er um eitt starv innan Heimarøktina og Serforsorgina. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, talan er um bæði dag-, kvøld- og samdøgursarbeiði; eins og vikuskiftisarbeiði og serstakir dagar.

Løn sambært sáttmálað við Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist**
Umsókn við hjálagdum próvskjølum og viðmælum skulu verða stovninum í hendi seinasta lagi 26. juli.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til stovnin á tlf. 229787 o g 258679

**Umlættingin á Garðavegi**
Garðavegur 38, tlf. 456320
700 Klaksvík

---

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Ljósmøður

Á Ljósmøðraskipanini á Landssjúkrahúsinum er tvey størv sum ljósmóðir á starvsbrøki 0,75 leys til setan 1. september 2005.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- starvsroyndir innan viðgongu-, føðing og barsilstíð
- fleksibul og positiv
- hug til tværfakligt samstarv

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Ruth Vang, ljósmøðrafakligur leiðari ella Randi við Brúgv, ljósmóðir, telefon 304500, lokal 5303.

**Løn- og setanarviðurskifti** smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Ljósmøðrafelag Føroya.

**Umsóknarfreistin** er 24. august 2005 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn** merkt »umsókn til starv« við avrit av prógvum, autorisatión, CV, viðmælum o.t. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

---

# Bátur til sølu

37 fót glastrevjabáturin, Hvítaberg, til sølu við fiskiloyvi 5A, um hóskandi boð fæst. Báturin er í sera góðum standi. Motorurin er ein uml. 4 ára gamal, vælhildin Ford. Báturin hevur nógva útgerð: 7 automatiskar snellur, línu og nógv annað.



**Nærri fæst at vita við at ringja tel 31 25 62 og 21 25 62**

---

## GÓÐSKULEIÐARI

Søkt verður eftir góðskuleiðari at byrja so skjótt til ber. Talan er um virkini í Skopun og heima á Sandi.

**Góðskuleiðarin hevur millum annað ábyrgd av hesum økjum:**
- Innaneftirlitsskipanin
- HACCP
- Samskifti við almennar heilsumynduleikar
- Reingerð og reinføri
- Etikettskipan
- Góðskuskrásetingar
- Kundasamstarv
- Klaguviðgerð
- Avskiping

**Førleikakrøv:**
- Fiskivinnuútbúgving
- Kunnleika til HACCP
- Góðan førleika í enskum máli
- Góð samstarvsevni

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi arbeiði í dynamiska fyritøku
- Fakliga menning
- Løn sambært avtalu

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Olsen, virkisleiðari á tel 211 316.

Umsóknafreistin er 1. august 2005 og skal sendast til:

**SANDOY SEAFOOD**
240 Skopun
Att. Andreas F. Hansen

---


**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820


---

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá mánadegi 25. juli.
Opið verður aftur 15. august 2005.

**Vestmanna kommuna**

---


**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum





**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo